# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Merkisdagur

Í dag er ársaðalfundur nummar 100 hjá Føroya Reiðarafelag. Við stovnan av felagnum varð enn eitt stig tikið til skipað viðurskifti á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Frammanundan var Skipara- og navigatørfelagið stovnað, og í 1911 tóku fiskimenn í Gøtu seg saman og stovnaðu Føroya Fiskimannafelag. Við hesum var tann parturin av vinnulívinum, sum hevði við sjógvin at gera, skipaður. Føroyar vóru veruliga við at gerast ein nútímans fiskivinnutjóð. Sum formaðurin í Reiðarafelagnum vísti á í útvarpinum í morgun, so hevur tað hesi 100 árini støðugt gingið upp og niður við føroyskari skipsfiskivinnu. Tað vil so vera, tí náttúrutilfeingið sveiggjar og hevur sveiggjað, alt tað vit vita. Feløgini, sum skipa arbeiðsmarknaðin innan fiskivinnuna hava drúgva siðvenju fyri at vera virkin ikki bert á sáttmálaøkjum eisini á vinnuøkinum. Í stórum bókaverki lýsir Erlendur Patursson, sáli, hvussu Reiðarafelagið so væl sum Fiskimannafelagið sýndu mikið dirvi og áræði, tá tær stóru búskaparkreppurnar skolaðu inn yvir samfelagið.

Ein uppgáva Reiðarafelagsins var at umboða reiðararnar mótvegis hinum partinum, fiskimanninum, og hetta gekk ikki altíð stillisliga til. Tey, sum eru komin nakað til árs, minnast ógvusligu verkføllini í fimtiárunum. Enn hongur skálkijarnið á skrivstovu Fiskimannafelagsins, meðan teir flestu, sum vóru úti á Redini, tá reiðarar og fiskimenn fóru til hendurs, eru farnir undir grønu torvu. Hart stríddust teir hvør í sínum lagi eitt beiskt stríð fyri at tryggja sær og sínum sámuligan part av einum vinnuligum ágóða, sum bert minkaði ár eftir ár. Tað er sjálvsagt bæði rætt og rímuligt ein slíkan merkisdag at vísa á tað framskygni, dirvi og áræði, sum einstakir undangongumenn innan reiðarayrki hvør í sínum lagi hava sýnt hesi hundrað árini. Men samstundis eigur ikki at vera gloymt, at tær stóru útbyggingar og nútímansgerðir av veiðiflota eins væl og fiskavirkjum høvdu ikki kunnað verið framdar uttan, at tær almennu Føroyar, átóku sær medábyrgd. Tær stóru útbyggingarnar og menningin av fiskiskipaflotanum, sum í fleiri umførum vórðu framdar frá fimtiárunum og til áttatiárini, kundu bert fremjast, tí hitt almenna tryggjaði búskaparligu karmarnar, ið at enda gjørdust so rúmir, at samfelagið kollsilgdi. Hetta er nú farin tíð, og frælsu marknaðarkreftirnar ráða einsamallar. Sambært formannin í Reiðarafelagnum er fiskivinnan nú á veg í enn ein aldudal og fyri fyrstu ferð síðan fimtiárini skulu marknaðarkreftirnar aftur standa sína roynd í Føroyum. Vit ynskja Reiðarafelagnum til lukku við merkisdegnum.

**Sosialurin**

## Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**23. partur**

Obadias profetur er bert ein kapitul, og hann byrjar júst sum hinir, við at siga hetta sama: **So sigur Harrin Harrin**. Tala hansara er serliga ímóti Edom. Edom er tann sami sum Esau. 1. Mós. 36,8. Obadias talar eisini dóm yvir hinar tjóðirnar.

Hann, sum fleiri av hinum, talar um "Dag Harrans" – ein øðiligan dóm yvir henda heim.

Men Ísrael skal verða frelst.

Jónas profetur byrjar á sama hátt: **Orð Harrans kom til Jónas, son Amittai; Hann segði.**

Jónas varð biðin um at fara til ein ávísan bý, Nineve, at kunngera dóm yvir býin. Søgan um Jónas er ein av teimum kendu søgunum í bíbliuni. Hann royndi at sleppa undan at fara, men endaði, eftir dramatiskar hendingar, í búkinum á einum stórum fiski. Var í búki fisksins í tríggjar dagar og tríggjar nætur í svárum kvølum og neyð, har hann onga bjarging sá sær at koma burturúr aftur. Men Gud vildi nakað við Jónasi, hann hoyrdi bøn hansara, og eftir boði Harrans , spýði fiskurin Jónas uppá turt. Síðani fór Jónas til Nineve, gekk gjøgnum býin, og rópti: " Um fjøruti dagar skal Nineve verða lagdur í oyði!" Tá trúðu nineve-menn á Gud og vendu við og róptu til Harran. Kongurin boðaði føstu og gav boð um, at tey skuldu rópa til Gud og venda við hvør av óndu leið síni og órættinum, ið hekk uppi í hondum hansara. Tá ið Gud sá, at tey vendu við, spardi hann býin,

Vit hava sæð, hvussu profetarnir profetera um dóm baði yvir jødar og heidningar fyri synd. Bók Jónasar lærir okkum, at Gud sparir okkum, tá ið vit venda við í álvara. Øll skriftin peikar á Kristus, hann hevur keypt okkum aftur til Gud við dýra blóði sínum, tá ið hann varð eitt syndoffur fyri okkum. Jesus sigur í Matt. 12,40-41:

"Tí eins og Jónas var tríggjar dagar og tríggjar nætur í búki havdýrsins, so skal Menniskjasonurin verða tríggjar dagar og tríggjar nætur í fangi jarðarinnar."

Menn úr Nineve skulu stíga fram í dóminum saman við hesi ætt og dómfella hana; tí teir vendu við, táið Jónas prædikaði fyri teimum - og hyggið, her er meir enn Jónas!"

Hevur tú vent við? Vit mugu venda við, 180 gradir, tí vit ganga burtur frá Gudi av náttúru. Men vit klára ikki at venda við sjálv. Men her er tað, evangeliið kemur inn. Jóh. ev. 1,12 sigur tað soleiðis:

"Men so mongum sum tóku ímóti Honum, gav Hann mátt at verða børn Guds - teimum, ið trúgva á navn Hansara."

Hevur tú av álvara takka Gudi fyri frelsuna, sum hann bjóðar fram, hvønn tann einasta dag, sum eina gávu.

Enn er náðihurðin opin,
Hvussu leingi verður tað.
Eingin veit frá tí at siga,
Tak mót Jesusi í dag.

**Framhald**

## Ein lambi, ein múli, ein skáli: trý kallkynsorð

EYÐUN Á BORG



Á Borg á Argjum í gýtusól 2008

Takk fyri staðfestingina, Steinbjørn!

Helt meg vita, at eg var á rættari leið, málsliga altso, men hugaligt at fáa staðkønan, sum eitur í Lambanum, at vátta tað. Takk fyri eina forvitnisliga frágreiðing! Ein onnur serkøn hevur annars eisini váttað tað.

Tú sigur, at eg havi tað fyri at blanda eftirnavnið í Lambanum uppí, tá eg greini kallkynsorðið ein lambi. Eg meini tað! Tað er júst tað, málið snýr seg um: kallkynsorðið ein lambi, ættarnavnið í Lambanum og bygdarnavnið (ein) Lambi, alt sama kallkynsorð!

FEGNAST UM BROYTING: Løgið, at tú eftir kallkynsniðurstøðuna frøist um málsliga ólagið, nú onkur ætlar at broyta orðið ein lambi til eitt lamba (ella hvat kyn Lamba nú er!?). Ein skáli skal broytast til ein skála, kvennkyn kanska!? Neyvan er talan um sagnorð, at skála!? Múli sleppur tó framvegis at eita ein múli! Skilji hvør, ið skilja kann!

ALTÍÐ SAGT TAÐ?: Soleiðis hava vit altíð sagt, vilt tú vera við. Ja, kanska nógv av okkum, sum nú eru uppi á døgum, men neyvan tey, sum livdu undan okkara tíð. Munnu fólk flest ikki ofta siga bygdarnavnið við fyrisetning, í/úr Lamba? Tað verður sjáldan brúkt í hvørfalli, ein Lambi.

Hugsi samstundis um føroysku tølini. Fá brúka tey á okkara døgum. Kortini brúktu allir føroyingar tey í nógvar øldir undan okkara tíð, t.v.s. fyri ár 1900.

E.S.: Koyr á, ÆB!

**Við málkvøðu**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.